

dansað í upptøkuhølunum hjá Kanal 5.

- Eg eri so von við at síggja hana kappast í fimleiki. Tað hevur hon gjørt frá, at hon var heilt lítil. Men eg var eitt sindur spent, hvussu tað mundi fara at ganga. Men tað var faktiskt eitt sindur skuffandi, tí man sá verri enn í sjónvarpinum, so tað var gott at síggja endursendingina dagin eftir, sigur Jóna og heldur fram:

- Eg havi alíkavæl upplivað okkurt stuttligt, t.d. í síðstu sending, tá vóru eini 4 gentur, ið mundu vera umleið 12 ár. Við einum skelti, har tað stóð "Vígdis Danse Rigtig Godt", tað er nokkso stuttligt at uppliva. Ein onnur hending var á veg út aftan á sendingina. Tá var ein 8 ára gomul genta, sum var har við mammu síni, sum hevði sæð, at vit høvdu tosað við Vígdis. Hon rópti á okkum: Hils Vigdis fra mig og ønsk rigtig tillykke!

## Dansaðu á loftinum

Vígdis var 6 ár tá hon byrjaði at ganga til ballett hjá Elsu Mariu í Havn.

- Eg skuldi melda Vígdis og systir hennara Tórgerð til fimleik, men var ov sein at melda tær til, so tí mátti eg velja okkurt annað ístaðin, og tað bleiv ballett. Tær dámdu hetta somikið væl, at tær hildu fram. Hetta var sjálvandi bara einaferð um vikuna, so tað kann ikki samanberast við ballettbørnini á tí Kongaliga. Men tær gingu eisini til fimleik og vóru báðar valdar til úrvalslið í bæði fríum- og amboðsfimleiki. Tær vandu altíð saman. Vígdis hevði í Tórgerð stórusystrina, at hyggja upp til og fáa íblástur frá, og hetta fekk hon nógv burtur úr, sigur Jóna og heldur fram:

Tær plagdu altíð at dansa á loftinum. Tær gjørdu plakatir og vimplar og settu stólar upp til okkum, og so skuldu vit hyggja, meðan tær dansaðu fyri okkum. Tá vit høvdu gestir, máttu vit taka teir við upp á loftið at hyggja, sigur Jóna til endans.

Meðan eg latið meg í jakkan greiðir hon frá, at tá Vígdis hóskvøldið skal á pallin í finaluni í Kan Du Danse? Verður hon væl stuðlað av familju, umframt mammuna og pápin Eliesar Olsen, kemur systurin Tórgerð úr London og onnur familja og vinir úr Føroyum og Danmark at hyggja.

*MARIA OLSEN FOTOGRAFUR hevur verið til sjós og tikið stórslignar fotomyndir umborð á fiskiskipum úr Föroyum, Hetlandi, Íslandi og Grönlandi.*

IMAGES OF FISHERMEN. 388 síður, meira enn 200 fantastiskar litmyndir. Ein snotulig bók, innbundin; gevur eina livandi og spennandi lýsing av fiskimonnnum í ymiskum fiskiskapi – eftir sild, upsa, toski, flatfiski, havtasku, hummara og rækjum. *Hetta er einasta bók av sínum slag – og fyrstu ferð at nakar lýsir fiskiveiði í Norður Atlantshavi so fullfíggjað í myndum.* Bókin inniheldur eisini eina framúrskarandi ritgerð um ta föroysku fiskidagaskipanina eftir tann heimskenda fiskivinnu serfröðingin Menakhem Ben-Yami. Innleiðing og frásagnir til myndirnar hevur Búi Tyril skrivað.




*IMAGES OF FISHERMEN er ein frægd fyri eygað og hartil sera upplýsandi – lesarin vil hyggja aftur og aftur. Ein jólagáva sum veruliga gleðir! Og veldugt virði í mun til prísin – fæst í bókabúðunum fyri bert 545 kr.*

GlobalOne PRESS · Marine Wealth · PRnewsMedia.com

bæði til børn og vaksin



fáast í 18 ymiskum litum

CROCS stivlar



ergo.fo

J.C. Svabosgøta 6 · FO-100 Tórshavn · Tlf 315 777 · Fax 315 772 · ergo@ergo.fo · www.ergo.fo